

# Fiskastovnar, náttúruviðurskifti, æti, fiskidagar og fiskimenn

Samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn í 2015

**Fiskastovnar, náttúruviðurskifti, æti, fiskidagar og fiskimenn - Samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn 2015**

Dennis Holm og Hertha Olsen, juni 2015

Fiskidaganevndin 2015.

*Forsíðumynd: Joe Nicholson.*

**Innihald**


Fororð ........ 5

Samandráttur ........ 6

Tilgongd og veruleikafatan ........ 6

Náttúruviðurskiftini í broyting ........ 6

Støðan hjá toskinum er batnað ........ 7

Framgongd hjá hýsuni 2. árið á rað ........ 7

Støðan hjá upsanum eitt sindur verri enn undanfarin ár ........ 7

1. Inngangur ........ 8

2. Háttalag ........ 9

2.1. Umboðan ........ 9

2.2. Evnið í samrøðunum ........ 10

2.3. Tilgongd og veruleikafatan ........ 10

3. Reiðskapur og høvuðsfiskasløg ........ 11

4. Náttúran í broyting ........ 13

4.1. Meiri lív í sjónum og nógv nebbasild ........ 13

4.2. Støðan betri enn undanfarin ár ........ 14

5. Støðan hjá toskastovninum ........ 15

5.1. Tað gongur rættan veg hjá toskinum ........ 15

5.2. Støddin av toskinum blandað ........ 16

5.3. Toskurin er feitur! ........ 17

5.4. Lata betur at tilgongdini ........ 17

5.5. Støðan hjá toskinum betur ........ 18

5.6. Samanumtikið: Støðan hjá toskinum er batnað ........ 19

6. Støðan hjá hýsustovninum ........ 20

6.1. Tað sær eitt sindur frægari út við hýsuni ........ 20

6.2. Fáa allar støddir av hýsu ........ 21

6.3. Hýsan er feit! ........ 21

6.4. Tilgongdin tann sama sum í fjør ........ 22

6.5. Batar í støðuni hjá hýsuni ........ 23

6.6. Samanumtikið: Framgongd hjá hýsuni 2. árið á rað ........ 23

7. Støðan hjá upsastovninum ........ 24

7.1. Støðan hjá upsanum versnað ....................24
7.2. Upsin stórur og miðalstórur....................25
7.3. Upsin er feitur!....................25
7.4. Lata ikki væl at tilgongdini av upsa ....................26
7.5. Støðan hjá upsanum verri enn í fjør....................26
7.6. Samanumtikið: Støðan hjá upsanum eitt sindur verri enn undanfarin ár....................27
8. Brosma og longa ....................28
9. Fiskidagar....................29

**Myndir**

Mynd 1. Svar og skipabólkar .................... 9
Mynd 2. Svar og reiðskapur....................11
Mynd 3. Luttøka í kanningini og høvuðsfiskasløg (í tali). ....................12
Mynd 4. Hvussu er støðan við æti – er nógv lív í sjónum ella? ....................13
Mynd 5. Hvussu er støðan við æti í ár í mun til undanfarin ár? ....................14
Mynd 6. Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til?....................15
Mynd 7. Er fiskurin stórur ella? ....................16
Mynd 8. Er fiskurin feitur? ....................17
Mynd 9. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini? ....................18
Mynd 10. Hvussu er støðan hjá toskinum í ár í mun til undanfarin ár?....................19
Mynd 11. Hvussu er støðan hjá hýsuni – er nógv til? ....................20
Mynd 12. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?....................21
Mynd 13. Er fiskurin feitur?....................22
Mynd 14. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini? ....................22
Mynd 15. Hvussu er støðan hjá hýsuni í ár í mun til undanfarin ár? ....................23
Mynd 16. Hvussu er støðan hjá upsanum – er nógv til?....................24
Mynd 17. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?....................25
Mynd 18. Er fiskurin feitur?....................25
Mynd 19. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini? ....................26
Mynd 20. Hvussu er støðan hjá upsanum í ár í mun til undanfarin ár?....................27
Mynd 21. Hevur tykkara bátur/skip nokk av fiskidøgum? ....................29
Mynd 22. Hevur tykkara bólkur nokk av fiskidøgum? ....................30
Mynd 23. Hvussu heldur tú sum heild, at talið av fiskidøgum hjá flotanum er?....................30

# Fororð

Hetta er fimta árið á rað, at Fiskidaganevndin letur gera samrøðukanning við fiskimenn umborð á skipum, sum virka innan karmarnar á Fiskidagaskipanini og fiska botnfisk undir Føroyum.

Samrøðukanningin er liður í arbeiðinum hjá Fiskidaganevndini at gera tilmælið til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna í botnfiskastovnunum, um fiskidagar og um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiár.

Kanningini og frágreiðingin verður gjørd á sama hátt ár um ár, soleiðis at samanberast kann við støðuna frá undanfarnum árum.

## Samandráttur

Fimta árið á rað hevur Fiskidaganevndin latið gjørt samrøðukanning millum føroyskar fiskimenn, sum eru í vinnu umborð á skipum sum virka undir Fiskidagaskipanini. Samrøðukanningin er ein liður í arbeiðinum hjá Fiskidaganevndini at geva tilmælið til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna í botnfiskastovnunum, um fiskidagar og um hvussu fiskiskapurin skal skipast komandi fiskiárið.

Umboð fyri meiri enn helvtina av skipum og bátum í bólkunum 2 til og við 5 hava luttikið í kanningini, og verður mett, at kanningin er eitt gott grundarlag til at kunna siga nakað um hvussu fiskimenn meta støðuna hjá fiskastovnunum verða, um hvussu náttúruviðurskiftini eru og ávirka lívið í sjónum.

## Tilgongd og veruleikafatan

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at tað hevur stóran týdning, at fiskimenn, sum hava dagliga yrki á sjónum, sleppa til orðanna og siga sína hugsan um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum og náttúruviðurskiftunum í sjónum. Hetta er eisini høvuðsorsøkin til at samrøðukanning er gjørd við fiskimenn og –kvinnur seinastu fimm árini.

Í mun til tær vísindaligu kanningarnar, vit vanliga kenna frá m.ø. Havstovuni, sum eru grundaðar á yvirlitstrolingar á ymiskum tíðum av árinum, við uppteljingum av fiski og øðrum úrslitum av yvirlitstrolingum, so er tilgongdin í samrøðukanningini grundað á, at roynt verður at seta orð á tann veruleikan, sum fiskimenn dagliga uppliva í sínum yrki á sjónum.

Talan er um tvær ymiskar tilgongdir, sum báðar hava til endamáls at royna og greina og meta um hvussu støðan hjá fiskastovnunum er og hvussu náttúruviðurskiftini eru í broyting og ávirka fiskasløgini. Bitið eigur at verða merki í, at tað grundleggjandi ikki er talan um at ein tilgongd er rættari ella meiri sonn enn onnur, hóast vit í kjakinum í Føroyum hava lyndið at velja síðu og hava tiltrúgv til eina tilgongd fram um hina.

Endamálið við samrøðukanningini við fiskimenn er at greina, tulka og seta orð á tey viðurskifti, sum fólk við dagligum yrki á sjónum uppliva støðuna í okkara høvuðsvinnu og náttúrugivnu umstøðurnar, tey virka í.

## Náttúruviðurskiftini í broyting

Undanfarin ár hava fiskimenn víst á, at náttúruviðurskiftini hava ført við sær vánaligar umstøður hjá fiskastovnunum. Aftur og aftur hevur í samrøðunum verið víst á, at onki æti er og hetta er millum høvuðsorsøkirnar til vánaligu støðuna hjá toskinum og hýsuni. Hesi seinastu 3 árini hevur hitin í sjónum eisini verður nevndur í samrøðunum, har víst verður á at hitin ávirkar tey traditionellu botnfiskasløgini skeiva vegin, samstundis sum hetta hevur skapt góðar umstøður fyri pelagiskum fiskasløgum.

Í teimum 52 samrøðunum gjørdu 48 fiskimenn viðmerkingar um støðuna hjá botnfiskastovnunum í mun til náttúruviðurskiftini. Sum heild tykist ein breið semja verða millum fiskimenn, at náttúruviðurskiftini í sjónum tey seinastu árini ikki hava verið tær røttu, og hetta hevur havt ávirkan á botnfiskastovnarnir. Í samrøðukanningini hevur ein heilt stórur meiriluti eisini víst á, at støðan hjá botnfiskastovnunum ikki er orsaka av ovurfisking.

Tá umræður spurningin um æti, so tykjast fiskimenn í ár hóma ein bata tá umræður spurninginum um æti.

Nógvir fiskimenn vísa í samrøðukanningini í ár á, at nógv lív er í sjónum og støðan sum heild er góð ella hampilig. Tendensurin er rættiliga greiður: Fiskimenn meta, at tað er støðan við æti er góð ella hampilig og at tað er meiri lív í sjónum enn fyrr. Ikki minst, so vísa nógvir fiskimenn á, at teir síggja nógva nebbasild og verður hetta mett verða eitt gott tekin.

## Støðan hjá toskinum er batnað

Annað árið á rað gevur samrøðukanningin millum fiskimenn greiða ábendingar um, at støðan hjá toskinum er batnað í mun til undanfarin ár. Fiskimenn lata væl at støðuni, tað er nógv meiri toskur til, toskurin er sera feitur, og hevur nógv at eta, ikki minst nebbasild. Fiskimenn meta eisini tilgongdina seinast árið hava verið betur enn undanfarin ár.

## Framgongd hjá hýsuni 2. árið á rað

Samanumtikið kann sigast, at fiskimenn í 2015, 2. árið á rað, lata betri at støðuni tá umræður hýsuni. Mett verður at meiri er til av hýsu, hýsan er feit og tað er ein góð blanding av øllum støddum. Mett verður eisini at tilgongdin er hampilig ella góð í mun til undanfarin ár.

## Støðan hjá upsanum eitt sindur verri enn undanfarin ár

Samanumtikið bendir samrøðukanningin á, at fiskimenn meta støðuna hjá upsanum verða eitt sindur verri enn undanfarin ár. Men tað tykist ikki verða nøkur greið felags fatan. Ein partur av fiskimonnunum vísa á, at støðan er ikki góð, ein partur at støðan er hampilig ella góð. Hetta kann m.a. verða orsaka av, at roynt verður á ymiskum leiðum. Upsin er stórur og feitur, men tilgongdin tykist framvegis ikki verða góð.

# 1. Inngangur

Í januar 2015 vóru tað umleið 1.450 menn og kvinnur, sum vóru skrásett at hava fiskiskap sum sína høvuðsinntøku. Hetta er nakað hægri enn í 2014, tá tað vóru umleið 1.300 fiskimenn og –kvinnur. Í veruleikanum er hetta fyrstu ferð í síðan 2003/2004, at talið av monnum og kvinnum, sum hava fiskiskap sum høvuðsinntøku er vaksið. Men talið av fiskimonnum og –kvinnum í januar 2015 er tó væl lægri enn tað var í t.d. í 2004, tá fleiri enn 2.700 menn og kvinnur høvdu fiskiskap sum høvuðsinntøku.

Ein partur av føroysku fiskimonnum og –kvinnum, og helst eisini ein lutfalsliga minni partur nú enn fyri t.d. 10 árum síðani, hava sítt dagliga yrki umborð á skipum, sum fiska botnfisk undir Føroyum. Í sínum dagliga yrki á sjónum fáa hesi møguleika at fáa innlit í hvussu støðan er hjá fiskastovnunum um hvussu náttúruviðurskiftini á og í havinum broytast og ávirka fiskastovnarnir.

Eins og undanfarin ár, er endamálið við samrøðukanningini í 2015 nettupp at savna vitan, um hvussu støðan er hjá høvuðsfiskasløgunum undir Føroyum, um hvussu náttúruviðurskiftini eru og eru broytt í mun til undanfarin ár, og hvussu fiskimenn og –kvinnur meta hetta ávirka fiskastovnarnir.

Dennis Holm og Hertha Olsen stóðu fyri kanningini, sum varð gjørd í mai og juni 2015.

# 2. Háttalag

Fiskidaganevndin hevur seinastu fimm árini, sum partur av arbeiðinum við tilmæli til landsstýrismannin í Fiskivinnumálum um støðuna í botnfiskastovnunum og fiskidagar, latið gjørt samrøðu kanning millum føroyskar fiskimenn, sum fiska við skipum, sum virka undir Fiskidagaskipanini.

Kanningin er ár um ár skipað sum ein samrøðu- og spurnablaðskanning og varð kanningin í 2015 gjørd í mai og juni mánað í 2015. Tilsamans luttóku 52 fiskimenn í kanningini. Samrøðukanningin er gjørd við fólk, sum eru í vinnu umborð á fiskiskipunum. Í einstøkum førum eru samrøðurnar tó gjørdar við fólk, sum hava tilknýtið til skipið, t.d. reiðaran á landi.

Samrøðurnar eru skrásettar í spurnablað, sum síðani er innlisið í hagtalsforrit. Tær nógvu hundraðtals útgreiningarnar og viðmerkingarnar í samrøðunum eru bólkaðar í evnir, sum eru ein týðandi partur í greiningini av kanningini.

## 2.1. Umboðan

Í juni 2015 vóru útskrivaði tilsamans 78 fiskiloyvir til skip í bólki 2, 3, 4A, 4B og 4T, og 31 loyvir til útróðrarbátar í bólki 5A. Av teimum 78 skipunum, sum hava fingið útskrivað loyvið í bólkunum 2 til og við 4T, vóru 64 í vinnu.

Sum nevnt vóru samrøður gjørdar 52 fiskimenn, sum tilsamans umboða 59 skip í Fiskidagaskipanini, 45 skip í bólkunum 2 til og við 4T og við umboð fyri 14 útróðrarbátar. Við øðrum orðum vóru samrøður gjørdar við umboð fyri umleið helvtin av skipunum í Fiskidagaskipanini.

Í myndini niðanfyri er býtið millum skipabólkarnir í kanningini í mun til útskrivaði loyvir.




*Mynd 1. Svar og skipabólkar*

Í flestu førum – 78% – er samrøða gjørd við skiparanum á skipinum/bátinum. 12% av svarunum eru frá stýrimanni, meðan 5% av svarunum eru frá øðrum av manning umborð á skipinum.

Umboð fyri meiri enn helvtina av skipum og bátum í bólkunum 2 til og við 5 og verður mett, at kanningin er eitt gott grundarlag til at kunna siga nakað um hvussu fiskimenn meta støðuna hjá fiskastovnunum verða, um hvussu náttúruviðurskiftini eru og ávirka lívið í sjónum.

## 2.2. Evnið í samrøðunum

Evnini í samrøðunum hava øll árini verið tey somu, og fevna um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum, um náttúruviðurskifti og æti, og harumframt verður eisini spurt um fiskidagatalið.

Kanningin er grundað á eitt samrøðu-spurnablað, har spurt verður um hvørji høvuðsfiskasløgini eru, og um hvussu støðan hjá hesum fiskasløgum er. Hesir spurningar verða spurdir um høvuðsfiskasløgini (toskur í hesum døminum niðanfyri):

- Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til?
- Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?
- Er fiskurin feitur?
- Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?
- Hvussu er støðan hjá toskinum í ár í mun til undanfarin ár?
- Eru onnur viðurskifti av týdningi, sum kunnu vísast á í smb. við toskin?

Í samrøðukanningini verður eisini spurt um náttúruviðurskifti og æti, og um fiskidagatal. Í samrøðuni verður at enda spurt um fiskimenn kunnu seta orð á hvørja teir meta orsøkina verða til vánaligu støðuna hjá nøkrum av høvuðsfiskasløgunum undir Føroyum.

## 2.3. Tilgongd og veruleikafatan

Fiskidaganevndin er av teirri greiðu fatan, at tað hevur stóran týdning, at fiskimenn, sum hava dagliga yrki á sjónum, sleppa til orðanna og siga sína hugsan um støðuna hjá høvuðsfiskasløgunum og náttúruviðurskiftunum í sjónum. Hetta er eisini høvuðsorsøkin til at samrøðukanning er gjørd við fiskimenn og –kvinnur seinastu fimm árini.

Í mun til tær vísindaligu kanningarnar, vit vanliga kenna frá m.ø. Havstovuni, sum eru grundaðar á yvirlitstrolingar á ymiskum tíðum av árinum, við uppteljingum av fiski og øðrum úrslitum av yvirlitstrolingum, so er tilgongdin í samrøðukanningini grundað á, at roynt verður at seta orð á tann veruleikan, sum fiskimenn dagliga uppliva í sínum yrki á sjónum.

Talan er um tvær ymiskar tilgongdir, sum báðar hava til endamáls at royna og greina og meta um hvussu støðan hjá fiskastovnunum er og hvussu náttúruviðurskiftini eru í broyting og ávirka fiskasløgini. Bitið eigur at verða merki í, at tað grundleggjandi ikki er talan um at ein tilgongd er rættari ella meiri sonn enn onnur, hóast vit í kjakinum í Føroyum hava lyndið at velja síðu og hava tiltrúgv til eina tilgongd fram um hina.

Endamálið við samrøðukanningini við fiskimenn er at greina, tulka og seta orð á tey viðurskifti, sum fólk við dagligum yrki á sjónum uppliva støðuna í okkara høvuðsvinnu og náttúrugivnu umstøðurnar, tey virka í.

## 3. Reiðskapur og høvuðsfiskasløg

Í hesum partinum verður hugt nærri at luttøkuni í kanningini, sæð í mun til við hvørjum reiðskapi skip og bátar royna við, og hvørji  høvuðsfiskasløgini eru.

Í kanningini telur húkaflotin 56%, meðan trolarar telja 44%; og svarar hetta nøkulunda til veruliga býtið av fiskiloyvum, har trolaraflotin (bólkur 2 og bólkur 4T) telur umleið 40% av útskrivaðu loyvunum.




*Mynd 2. Svar og reiðskapur*

Toskur og hýsa, og upsi eru týðandi fiskasløg hjá skipum og bátum, sum virkað undir FIskidagaskipanini. Harumframt eru tað fleiri skip, sum siga brosmu og longu verða týðandi fiskasløg.

Teir stóru trolararnir í bólki 2 fiska serliga upsa, men eisini svartkalva, stinglaks og gulllaks. Teir smærri trolararnar í bólki 4T fiska serliga tosk, hýsu, flatfisk og havtasku. Hjá húkaflotanum, bólkur 3, 4A, 4B og 5, eru toskur og hýsa týðandi fiskasløg, men eisini brosma og longa eru týðandi fiskasløg hjá pørtum av húkaflotanum.




*Mynd 3. Luttøka í kanningini og høvuðsfiskasløg (í tali).*

Í samrøðukanningin varð spurt hvørji fiskasløg eru týðandi fyri einstaka skipið, og talvan vísir hvørji fiskasløg skipini siga verða høvuðsfiskasløg hjá teimum.

# 4. Náttúran í broyting

Í samrøðukanningunum, sum eru gjørdar millum fiskimenn tey seinastu fimm árini, hevur eitt afturvendandi evnið verið *broytingar í náttúruviðurskiftunum*. Í kanningunum hevur verið víst á – hetta serliga tey seinastu 3-4 árini – at nattúran er í broyting og hetta hevur stóra ávirkan á fiskastovnarnir.

Undanfarin ár hava fiskimenn víst á, at náttúruviðurskiftini hava ført við sær vánaligar umstøður hjá fiskastovnunum. Aftur og aftur hevur í samrøðunum verið víst á, at onki æti er og hetta er millum høvuðsorsøkirnar til vánaligu støðuna hjá toskinum og hýsuni. Hesi seinastu 3 árini hevur hitin í sjónum eisini verður nevndur í samrøðunum, har víst verður á at hitin ávirkar tey traditionellu botnfiskasløgini skeiva vegin, samstundis sum hetta hevur skapt góðar umstøður fyri pelagiskum fiskasløgum.

Í teimum 52 samrøðunum gjørdu 48 fiskimenn viðmerkingar um støðuna hjá botnfiskastovnunum í mun til náttúruviðurskiftini. Sum heild tykist ein breið semja verða millum fiskimenn, at náttúruviðurskiftini í sjónum tey seinastu árini ikki hava verið tær røttu, og hetta hevur havt ávirkan á botnfiskastovnarnir. Í samrøðukanningini hevur ein heilt stórur meiriluti eisini víst á, at støðan hjá botnfiskastovnunum ikki er orsaka av ovurfisking.

Tá umrædur spurningin um æti, so tykjast fiskimenn í ár hóma ein bata tá umrædur spurninginum um æti.

## 4.1. Meiri lív í sjónum og nógv nebbasild

Nógvir fiskimenn vísa í samrøðukanningini í ár á, at nógv lív er í sjónum og støðan sum heild er góð ella hampilig. Nakrir fiskimenn hava svarað “annað” og vísa í viðmerkingunum á, at teir meta støðuna verða ringa. Leggjast kann afturat, at fiskimenn vísa á, at á summum leiðum er ikki nógv lív í sjónum, meðan tað aðrastaðni er óvanliga nógv lív í sjónum.

Tendensurin er sostatt rættiliga greiður: Fiskimenn meta, at tað er støðan við æti er góð ella hampilig og at tað er meiri lív í sjónum enn fyrr.




*Mynd 4. Hvussu er støðan við æti – er nógv lív í sjónum ella?*

## 4.2. Støðan betri enn undanfarin ár

Eisini tá spurt verður um hvussu støðan viðv. æti í ár er í mun til undanfarin ár, so eru fiskimenn sum heild meiri bjartskygdir. Fleiri enn 35% vísa á, at støðan er góð í mun til undanfarin ár, meðan umleið 35% vísa á at støðan er hampilig. Millum 10 og 15% vísa á at støðan er ring ella svarað annað (fleiri av teimum, sum svara annað, siga seg ikki duga at meta um hvussu støðan í ár er í mun til undanfarin ár).




*Mynd 5. Hvussu er støðan við æti í ár í mun til undanfarin ár?*

Eins og í fjør vísa fiskimenn í ár serliga á, at tað er væl meiri nebbasild at síggja nú enn undanfarin ár. Nebbasild er sum kunnugt týðandi føði hjá toskinum, tí verður eisini mett, at hetta er eitt gott tekin. Sum nevnt, so meta summir fiskimenn tó, at støðan er ring viðv. æti.

Nakrar av viðmerkingunum í samrøðukanningini eru niðanfyri.

*Ongantíð verið so gott lív í sum nú – sild, svartkjaft, gulllaksur, makrelur. Nógvur svartkjaftur í øllum svartkalvum. Nógv føði er her úti, sum vit fiska.*

*Nógv nebbasild, nógvur seiður, nógvur fuglur. nógv frægari enn í fjør. Sær bara hampiligt út. Hava fingið meir síðani veðrið batnaði.*

*Eitt av teimum fáu árinum, har vit síggja nebbasild í netinum í trolinum.*

*Út av lagið vánaligt við æti, serliga ringt við Norðoyggjarnar við fugli. Fáa allastaðni smáan seið við línuni – púra ókent – seiðurin er stak illa fyri (deyðarak)*

*Nógv mest av æti í ár, í mun til undanfarin ár. Langt síðani eg havi sæð so nógv æti í fiskinum.*

*Ikki nógv át í fiskinum sjálvum. Tað var frægari í fjør.(Fiskar á innaru leið)*

# 5. Støðan hjá toskastovninum

Toskurin hevur søguliga sæð verið eitt týðandi fiskaslag, tá umræður fiskiskapin eftir botnfiski undir Føroyum. Góð toskaár hava ávirkar raksturin hjá flotanum rætta vegin, meðan vánalig toskaár ávirka skeiva vegin.

Seinastu árini er nøgdin av toski, sum verður fiskað undir støðugt minkað. Í fjør vístu fleiri fiskimenn í samrøðukanningini á, at batar vóru at hóma við toskastovninum. Men hvussu meta fiskimenn støðuna hjá toskinum í 2015?

## 5.1. Tað gongur rættan veg hjá toskinum

Í samrøðukanningini í 2012 og 2013 lótu fiskimenn illa støðuni hjá toskinum og ein munandi partur vístu á, at støðan hjá toskinum var ring. Í 2014 vístu fleiri á, at batar vóru at hóma – í mun til árini 2012 og 2013 vístu fleiri á, at støðan var hampilig og góð, meðan lutfalsliga fáir fiskimenn søgdu støðuna verða ringa.

Úrslitini av samrøðukanningini í ár eru sambærilig við úrslitini í 2014. Fiskimenn lata sum heild betri at, umleið 75% søgdu støðuna verða hampiliga ella góða. 19% søgdu støðuna verða ring, men umleið 5% søgdu annað

Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 6. Hvussu er støðan hjá toskinum – er nógv til?*

Eins og í fjør vístu fiskimenn í ár á, at toskurin er stórur og feitur og at tað sum heild sær frægari út. Einstakir fiskimenn vístu tó á, at støðan ikki var góð, og tað kanska serliga orsaka av ringu tilgongdini.

Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Toska stovnurin sær út til at ganga upp eftir. Miðalstøddin er heilt góð fyri tíðina. Tó nakað feitari enn fyri ári síðani. Tað ser út til at gongdin er rætta vegin. Tað er væl meira av toski blanda upp í veiðuna í mun til undan farin ár.*

*Støðan hjá toskinum er nakað hin sama sum í fjør,  men hon er ikki góð. Góður stórur fiskur í vár, nógv smátt annars. Fái tað sama við snellu, sum onnur ár.*

*Toskurin hevur nokk av føði, nebbasild, hvítingsbróður o.a. Sera lítil roynd á landleiðini, men sera nógvur toskur í.*

*Tað sær frægari út hjá toskinum í ár enn í fjør. Fáa blandaðar støddir og nakað av smáum er uppií.*

*Tá I-kassin lat upp fyrst í apríl: Í umleið 10 ár, hevur tað ikki verið so nógvur fiskur har at byrja við sum í ár. Nógv nebbasild var í fiskinum*

*Tað sær heldur frægari út við toskinum, frægari enn í fleiri ár. Støddirnar eru miðal, men heldur lítið til av stórum fiski. Allar støddir eru fullir av nebbasild.*

*Sær betur út nú hjá toskinum, enn tað hevur gjørt eina tíð, í nøkur ár. Fiskurin er meiri víða um enn hann hevur verið seinastu árini. Tá ið nógvur fiskur var fyrr, har er fiskur nú aftur at fáa. Tað hevur tað ikki verið. Toskurin er eisini feitur, stóra fulla livur.*

*Toskurin, ikki góð støða, men frægari. Nakað tað sama í eini 2 til 3 ár, tá tað er veður at fiska*

*Tilgongdin hjá toskinum hevur verið ring í fleiri ár, men tað sær betur í heyst (2014) enn onnur heyst.*

## 5.2. Støddin av toskinum blandað

Eins og í fjør, verður í ár víst á, at toskurin er miðal stórur og stórur. Í viðmerkingunum er eisini víst á, at nakað av smáum er blandað uppí. So sum heild er støddin av toskinum blandað.




*Mynd 7. Er fiskurin stórur ella?*

## 5.3. Toskurin er feitur!

Seinastu árini hevur myndin verið greiðari og greiðari tá umræður spurninginum um toskurin er feitur. Í ár er myndin heilt greið: Toskurin er sera feitur, hetta svarað 84%, meðan 16% siga toskin verða miðalfeitan. Í viðmerkingunum verður eisini víst á, at toskurin er feitur og hevur fulla livur.




*Mynd 8. Er fiskurin feitur?*

At toskurin er feitur merkir eisini, at hann hevur nokk at eta. Fyri framtíðar vónirnar hjá toskinum er tað eisini av stórum týdningi, at fiskimenn aftur í ár staðfest, at teir síggja nógva nebbasild og at toskurin er fullur av nebbasild. Hetta var ikki støðan í samrøðukanningunum, sum vórðu gjørdar fyri 4 og 5 árum síðani.

Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Væl meir av nebbasild er at síggja á leiðunum har bólkur 4T fiskar, í ár í mun til undanfarin ár.*

*í vár var æti, har var nebbasild – nebbasildin, so er gott.*

*Síggja nebbasild í fiskinum. Fyrr var tað meir krossfiskur í fiskinum. Hvítingsbróður og svartkjaftur er eisini í fiskinum.*

## 5.4. Lata betur at tilgongdini

Eisini tá umræður tilgongdina av toski lata fiskimenn betur at í 2015 enn undanfarin ár. Í 2012, 2013 og 2014 lótu fiskimenn sum heild illa at tilgongdini, tó so lótu fiskimenn betur at í 2014 enn undanfarin ár. Í samrøðukanningini í 2015 er greitt, at fiskimenn meta støðuna verða betri enn undanfarin ár.

Í mun til seinastu trý árini, so er 2015 fyrsta árið, at tey, sum siga tilgongdina verða hampiliga ella góð eru fleiri enn tey, sum siga tilgongdina verða ringa. 53% søgdu tilgongdina verða hampiliga og 6% at tilgongdin hevur verið góð. Meðan 36% søgdu tilgongdina verða ringa.




*Mynd 9. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

Fiskimenn vísa í samrøðuna á, at tilgongdin er betri og at tað er nógv meiri smátt, enn tað hevur verið fyrr.

Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Tað er frægari við toskinum enn tað hevur verið. Fáa blandaða stødd, bæði stórt og smátt.*
*Tað er ein ávís tilgongd, tað er langt síðani at fiskaríið er blivið frægari út á árið, men soleiðis er í ár.*

*Tilgongdin er frægari nú, hendan góða gongdin byrjaði í 2014.*

*Støðan hjá toskinum er góð, fáa meir og meir tosk. Tað er gott slag og blandað stødd. Frægasta tilgongd í langa tíð í heyst 2013 og vár 2014.*

*Generelt er støðan vánalig, men ikki verri í ár enn onnur ár, heldur frægari í ár.*

## 5.5. Støðan hjá toskinum betur

Tvey tey seinastu árini er metingin hjá fiskimonnum av støðuni hjá toskinum broytt til at tey meta støðuna verða hampiliga ella góða. Til samanberingar kann sigast, at ein meiriluti av fiskimonnunum í 2013 søgdu støðuna verða ringa. Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 10. Hvussu er støðan hjá toskinum í ár í mun til undanfarin ár?*

Í samrøðunum vístu fiskimenn eisini á, at støðan hjá toskinum í ár er betri enn undanfarin ár. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Tilgongdin er hampilig, støðan batna í mun til undanfarin ár, sær gott út við føðini, nógv nebbasild.*

*Vit kunnu ikki klaga um toskin. Vit hava fingið nógv meir tosk í ár enn undanfarin ár.*

*Støðan hjá toskinum er nakað hin sama sum í fjør, men hon er ikki góð. Góður stórur fiskur í vár, nógv smátt annars. Fái tað sama við snellu, sum onnur ár.*

*Toskurin, ikki góð støða, men frægari. Nakað tað sama í eini 2 til 3 ár, tá tað er veður at fiska*

## 5.6. Samanumtikið: Støðan hjá toskinum er batnað

Annað árið á rað gevur samrøðukanningin millum fiskimenn greiða ábendingar um, at støðan hjá toskinum er batnað í mun til undanfarin ár. Fiskimenn lata væl at støðuni, tað er nógv meiri toskur til, toskurin er sera feitur, og hevur nógv at eta, ikki minst nebbasild. Fiskimenn meta eisini tilgongdina seinast árið hava verið betur enn undanfarin ár.

# 6. Støðan hjá hýsustovninum

Eins og við toskastovninum, so hevur støðan hjá hýsustovninum í fleiri ár verið ring. Hetta hava fiskimenn eisini staðfest í samrøðukanningunum árini 2011, 2012 og 2013. Tey seinastu tvey árini hava fiskimenn tó víst á, at tað spakuliga gongur rætta vegin við hýsuni, og støðan er betri enn undanfarin ár..

## 6.1. Tað sær eitt sindur frægari út við hýsuni

Eins og í fjør, eru tað í ár fleiri sum í samrøðukanningini vísa á, at støðan hjá hýsuni er hampilig ella góð – 53% vístu á at støðan er hampilig og 9% at støðan er góð. Í mun til árini 2012 og 2013, har umleið 85% og umleið 65% søgdu støðuna verða ringa, so siga 38% støðuna verða ringa í 2015.

Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 11. Hvussu er støðan hjá hýsuni – er nógv til?*

Sum heild eru tað sostatt fleiri sum vísa á at tað sær eitt sindur frægari út og færri at støðan er ring, hetta gekk eisini aftur í viðmerkingunum í samrøðukanningini.

*Fáa allar støddir, nógvan smáan fisk íblandaðan. Seinastu tvey árini eru allar støddirnar at fáa, so tað er blandaður fiskur. Støðan er nógv betur í ár enn undanfarin ár.*

*Meiri av hýsu nú, uppeftirgangangdi. Sóu lítla hýsu í fiskiskapinum í heyst – men tað royna vit at umganga.*

*7 ár síðani bara stór hýsa. Nú eru allar støddir. Størra helvtin sum vit fiska er nú hýsa í dag.*

*Fáa heldur nógva hýsu hesa tíðina av árinum, tað plagar ikki at verða so.*

*Betur enn støðan hevur verið, men støðan framvegis ring*

## 6.2. Fáa allar støddir av hýsu

Sum nevnt omanfyri, so eru fiskimenn meiri bjartskygdir tá umræður hýsuna, soleiðis er eisini tá tosa verður um støddirnar av hýsuni. Sum heild verður víst á, at teir fáa allar støddir av hýsu, hetta framgongur eisini av myndini niðanfyri.




*Mynd 12. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?*

Í viðmerkingunum varð eisini víst á, at tað sær betri út, tá umræður blandingina av støddum, ikki minst samanborið við árið 2011, tá tað at kalla bara var stór hýsa at fáa.

*Fáa allar støddir. Tað er meiri hýsa enn tað hevur verið í fleiri ár.*

*Nógv av smáari hýsu uppi í fiskarínum – so góð tilgongd*

*Fáa allar støddir, nógvan smáan fisk íblandaðan. Seinastu tvey árini eru støddirnar at fáa, so tað er blandaður fiskur. Støðan er nógv betur í ár enn undanfarin ár.*

## 6.3. Hýsan er feit!

Eins og við toskinum eru fiskimenn á einum máli um, at hýsan er feit. 84% søgdu at hýsan er feit og 10% søgdu at hýsan er miðalfeit. Í mun til undanfarin ár, so siga væl fleiri í ár, at hýsan er feit. Sí eisini  myndina niðanfyri.




*Mynd 13. Er fiskurin feitur?*

## 6.4. Tilgongdin tann sama sum í fjør

Tá umræður tilgongdini, so siga fiskimenn í samrøðukanningini støðuna verða hampiliga (43%) ella góða (10%), men í mun til í fjør, so eru tað eitt sindur fleiri, sum siga tilgongdina verða ringa. Samanborið við árini 2011, 2012 og 2013 tykjast fiskimenn meta støðuna verða betri í ár enn hesi árini.




*Mynd 14. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

*Teir smáu árgangirnar av hýsu eru betur nú – har er nógv at síggja.*

*Nógv av smáari hýsu uppi í fiskarínum – so góð tilgongd.*

*Vit síggja minni hýsu í ár enn í fjør.*

## 6.5. Batar í støðuni hjá hýsuni

Hóast støðan hjá hýsuni ikki er góð, so hava fiskimenn seinastu tvey árini, í 2014 og 2015, í samrøðukanningunum víst á, at støðan er hampilig ella góð í mun til undanfarin ár. Munurin á 2015 og 2014 er, at eitt fleiri í 2015 siga støðuna verða ringa.

Í kanningini vísa 70% á, at støðan hjá hýsuni er góð (13%) ella hampilig (57%), og bendir hetta á, at fiskimenn eisini í 2015 meta, at eru batar at hóma í støðuni hjá hýsuni.




*Mynd 15. Hvussu er støðan hjá hýsuni í ár í mun til undanfarin ár?*

## 6.6. Samanumtikið: Framgongd hjá hýsuni 2. árið á rað

Samanumtikið kann sigast kann sigast, at fiskimenn í 2015, 2. árið á rað, lata betri at støðuni tá umrræður hýsuni. Mett verður at meiri er til av hýsu, hýsan er feit og tað er ein góð blanding av øllum støddum. Mett verður eisini at tilgongdin er hampilig ella góð í mun til undanfarin ár.

## 7. Støðan hjá upsastovninum

Upsin undir Føroyum verður sum heild fiskaður við troli, serliga av trolarunum í bólki 2, men harumframt verður nakað av hýsu eisini fiskað við húki, bæði av størri og smærri útróðrarbátum.

### 7.1. Støðan hjá upsanum versnað

Í samrøðukanningunum í 2014 og í 2015 eru tað fleiri fiskimenn enn undanfarin ár, sum vísa á, at støðan hjá upsanum er ring. Árið 2015 er sostatt triðja árið á rað, at alsamt fleiri fiskimenn vísa á, at støðan hjá upsanum er ring. Í mun til 2014, so vísir ongin í samrøðukanningini í 2015 á, at støðan hjá upsanum er góð, hinvegin vísa fleiri á, at støðan hjá upsanum er hampilig.




*Mynd 16. Hvussu er støðan hjá upsanum – er nógv til?*

Í samrøðukanningini gjørdu fiskimenn eisini viðmerkingar um støðuna hjá upsanum. Nakrar av viðmerkingunum eru niðanfyri.

*Støddin á upsanum er ymisk alt hvar ein roynir. Fingu meiri upsa fyrr, tað hevur bara versna.*

*Støðan hjá upsanum kann næstan ikki verða verri. Upsin er ymiska stødd, alt eftir hvar man fiskar.*

*Tað sær frægari út við upsanum í ár enn seinastu 2 til 3 árini. Støddin er nøkulunda, men tað er minni til av stórum fiski enn tað hevur verið. Tilgongdin er tó ring, eingin upsi verður eftir, um tað heldur við á sama hátt.*

*Støðan hjá upsanum er tann besta í langa tíð. Sera nógv av smáum upsa er uppí nú, hava havt fleiri ár, har smái upsin var burtur. Í tvey ár hava vit bara fingið stóran upsa, nú eru 5´arar koma upp í fiskaríi.*

*Broytingin til smáan upsa er hend nýliga. Einki hevur verði av smáum upsa seinastu 2-3 árini, men nú er broyting komin , tí nú er smái upsin komin aftur (5´ara)*

## 7.2. Upsin stórur og miðalstórur

Árini 2013 og 2014 varð víst á, at upsin í stødd var av góðari blanding. Í 2012 vístu fiskimenn á, at upsin sum heild var smáfallandi, meðan støðan í 2015 tykist verða tann, at upsin sum heild er størri. Fleiri vísa á, at upsin er stórur og miðalstórur, meðan ongin vísur á, at upsin er smáfallandi. Í viðmerkingunum eru tað tó nakrir fiskimenn, sum vísa á, at tann smái upsin eisini er komin uppí fiskaríið.




*Mynd 17. Hvussu við støddini – er fiskurin stórur ella?*

## 7.3. Upsin er feitur!

Tey seinastu trý árini hava fiskimenn víst á, at upsin er feitur ella miðalfeitur. Í ár eru úrslitini í samrøðukanningini enn greiðari. Fleiri enn 80% siga upsan verða feitan. Ongin at upsin ikki er feitur. Sostatt eru metingarnar fyri bæði tosk, hýsu og upsa tær somu: Fiskurin er feitur. –Og bendir hetta á, at fiskurin hevur nokk at eta.




*Mynd 18. Er fiskurin feitur?*

## 7.4. Lata ikki væl at tilgongdini av upsa

2. árið á rað, eru fiskimenn heldur ivasamir tá umræður tilgongdini av upsa. Hvørki í 2014 ella í 2015 varð víst á, at tilgongdin av upsa hevur verið góð seinastu árini. Í 2015 eru tað tó nakað fleiri enn í 2014, sum vísa á, at tilgongdin er hampilig – 46% siga tilgongdina verða hampiliga, meðan 38% siga tilgongdina verða ringa.




*Mynd 19. Hvussu hevur tilgongdin verið seinastu árini?*

Í viðmerkingunum hava nakrir fiskimenn eisini víst á ivan í samband við tilgongdina.

> *Tað sær frægari út við upsanum í ár enn seinastu 2 til 3 árini. Støddin er nøkulunda, men tað er minni til av stórum fiski enn tað hevur verið. Tilgongdin er tó ring, eingin upsi verður eftir, um tað heldur við á sama hátt.*
>
> *lítið vaksið, stendur í stað. Minni og minni til. Lítið til og ikki nógv skip sum fiska upsa.*

## 7.5. Støðan hjá upsanum verri enn í fjør

Hóast tað eru fleiri fiskimenn, sum ikki lata so væl, og vísa á, at støðan er verri enn í fjør, so eru tað framvegis ein meiriluti av fiskimonnunum, sum í samrøðukanningini vísa á, at støðan hjá upsanum er hampilig (62%) ella góð (8%), meðan 23% siga støðuna verða ringa í mun til undanfarin ár.




*Mynd 20. Hvussu er støðan hjá upsanum í ár í mun til undanfarin ár?*

## 7.6. Samanumtikið: Støðan hjá upsanum eitt sindur verri enn undanfarin ár

Samanumtikið bendir samrøðukanningin á, at fiskimenn meta støðuna hjá upsanum verða eitt sindur verri enn undanfarin ár. Men tað tykist ikki verða nøkur greið felags fatan. Ein partur av fiskimonnunum vísa á, at støðan er ikki góð, ein partur at støðan er hampilig ella góð. Hetta kann m.a. verða orsaka av, at roynt verður á ymiskum leiðum.

Upsin er stórur og feitur, men tilgongdin tykist framvegis ikki verða góð.

## 8. Brosma og longa

Í kanningini varð eisini spurt um støðuna hjá øðrum fiskasløgum, millum fiskasløgini, sum fleiri skip fiska, er brosma og longa.

Í samrøðukanningini vístu fiskimenn á, at støðan hjá brosmuni er hampilig. Støddin er góð ella miðal góð og fiskurin er feitur. Fiskimenn meta, at tilgongdin hevur verið góð ella hampiliga góð. Í mun til undanfarin ár, so vísa fiskimenn á, at tað ávirkar fiskiskapin eftir brosmu, at norðmenn nú aftur fiska brosmu (norðmenn hava ikki fiskað brosmu seinastu árini orsaka av makrelstríðnum sum var).

Í samrøðukanningin vísa fiskimenn á, at støðan hjá longuni er góð. Longan er stór og feit og mett verður at tilgongdin hevur verið hampiliga góð. Eisini verður mett, at tilgongdin er hampiliga góð. Eins og við brosmuni, so siga fiskimenn tað ávirka, at norðmenn nú aftur fiska longu.

# 9. Fiskidagar

Umframt fiskastovnar, náttúruviðurskifti og æti, so hevur tað eisini á hvørjum ári verið spurt um fiskidagar og talið av fiskidøgum, bæði hjá tí einstaka bátinum/skipinum, hjá bólkinum og talið av fiskidøgum sum heild.

Seinastu árini er talið av fiskidøgum minkað ár um ár. Fiskiárið 2014/2015 vóru tillutaðir tilsamans 22.182 fiskidagar, fleiri enn 10.000 fiskidagar færri enn í 2007/2008, og góðir 27.000 fiskidagar færri enn í 1996/1997, tá Fiskidagaskipanin varð sett í gildi.

Tað er ymiskt frá einum báti/skipi til annað, um talið av fiskidøgum er nøktandi ella ikki. Hetta framgongur eisini greitt í samrøðukanningini, og er orsøkin tann, at summi skip í veruleikanum hava nokk av fiskidøgum, meðan onnur ikki hava nokk.

Í mun til undanfarin ár, so eru tað fleiri í samrøðukanning í ár, sum vísa á, at teir hava nokk av fiskidøgum. Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 21. Hevur tykkara bátur/skip nokk av fiskidøgum?*

Í samrøðunum varð tó víst á, at sum fiskiskapurin var í løtuni, so var talið av fiskidøgum nøktandi, men fiskimenn eru tó ivasamir um talið av fiskidøgum er nokk, um fiskiskapurn aftur gerst heilt góður, eins og hann var t.d. miðskeiðis í 1990unum.

Eisini tá spurt verður um bólkurin av bátum/skipum hevur nokk av fiskidøgum, so eru tað í ár fleiri enn undanfarin ár, sum siga, at teirra bólkur hevur nokk av fiskidøgum. Sí eisini myndina niðanfyri.




*Mynd 22. Hevur tykkara bólkur nokk av fiskidøgum?*

Tá spurt varð um talið av fiskidøgum hjá flotanum sum heild, so eru tað í ár eisini fleiri sum siga talið av fiskidøgum verða gott ella nøkulunda, meðan tað eru færri sum siga talið av fiskidøgum verða ov lágt.




*Mynd 23. Hvussu heldur tú sum heild, at talið av fiskidøgum hjá flotanum er?*

Millum orsøkirnar til at fleiri fiskimenn vísa á, at talið av fiskidøgum er gott ella nøkulunda, er, at tað seinastu árini er farin fram ein tillaging í fleiri bólkum í Fiskidagaskipanini, har skip og loyvir eru keypt og løgd saman fyri at hækka talið av fiskidøgum hjá skipum í vinnu.

Harumframt er fiskiskapurin hjá fleiri bólkum broyttir frá at royna á innaru leiðum til at royna á ytru leið. Hetta hevur eisini stóra ávirkan á hvussu nógvir fiskidagar skipini brúka. Fiskidagaskipanin er samansett soleiðis, at fyri bólk 2, 3, 4A, 4B og 4T telja fiskidagar á ytri leið 3:1. Tað vil siga, at eitt línuskip í bólki 3, ið roynir eftir longu og brosmu og svartkalva á ytri leið, skal fiska í 3 dagar fyri, at tað telur 1 brúktan fiskidag í skipanini.

Fiskidagaskipanin hevur eisini skipan viðvíkjandi skifti av reiðskapi frá línu til snellu, og er hetta galdandi fyri útróðrarbátarnir í bólkunum 4A og 4B, har fiskidagarnir telja 2:1. Tað vil siga, at ein útróðrarbátur í bólki 4A á snelluveiðu skal fiska í 2 dagar, fyri at tað telur 1 brúktan fiskidag í skipanini.

Hesi viðurskifti hava ávirkan á, um talið av fiskidøgum er nøktandi ella ikki.